## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

P/F Fjarðahús, timburhandil og byggibúð:

# Alt frá seymi til sniðhús

**Mánadagin 6. desember var móttøka í nýggja stásiliga handlinum "P/F Fjarðahús, timburhandil og byggibúð" á Langasandi í Kollafirði. Talan er um Vestmanna Timburhandil, sum hevur skift navn og er nú bæði í Kollafirði og Vestmanna**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Christian Christiansen, fyrrverandi stjóri á Langasandur Timburhandli, ynskti eigarunum, Óla Hansen og Regini Joensen, tillukku við nýggja timburhandlinum*

Fyri trimum árum síðan keyptu Regin Joensen og Óli Hansen P/F Vestmanna Timburhandil, og nú hava teir eisini leigað bygningin í Kollafirði, har Langasandur Timburhandil var í mong ár.

Um orsøkina til at teir júst hava valt Kollafjørð, siga eigararnir, at síðan Vágatunnilin lat upp, liggur Kollafjørður sera væl fyri, tað tekur eins umleið 15 minuttir at koyra úr Vágum, Eysturoynni, úr hinum bygdunum á Streymoynni og úr Havn.

Bygningurin er 700 fermetrar, harav byggibúðin er umleið 120 fermetrar. Umframt er eisini uttandura timburgoymsla.

Hjá P/F Fjarðahús, byggibúð og timburhandli kunnu fólk keypa alt frá seymi til eini heil hús, siga eigararnir av nýggja timburhandlinum. Handilin selur eisini VVS-vørur, útgerð til frítíðarfiskarar, og gávulutir.

Framleiðslan av Fjarðahúsum er í Vestmanna, har starvast fýra fólk og í Kollafirði eru tey seks. Umframt hesi hevur fyritøkan samstarvsavtalur við 20 timburmenn, sum seta húsini upp.



*Byggibúðin, ið er stór og fjølbroytt, selur eisini VVS-vørur, útgerð til frítíðarfiskarar og gávulutir*




*Brøðurnir Jógvan og Kristian á Dul frá P/F Mariu Poulsen*




NÚ ERU TEIR ENDILIGA HER
TEIR VÆLUMTÓKTU BH Í
BUMMULL UTTAN BOYLA

parfumarí Drós

BØGØTA 15 · BOKS 24 · TEL 314811 · FAX 314877

GER VAKURLEIKA TIL VERULEIKA

Sosialurin 341800

JÓLAGÁVAN
TAMARIS · fáast eisini svartir

439,-



Pf. FÓTBÚNI
TRÓNDARGØTA 23 • TLF. 31 17 05
EURO SKO EURO SKO

Sosialurin 341800